Nr. 2 | 15. mars 2008 | 61. árið

Kirkjuligt Missiónsblað

# TAÐ ER FULLGJØRT

Jákup Olsen
skrivar

*"Øðrum hevur hann hjálpt, men sær sjálvum er hann ikki mentur at hjálpa!" - Matt. 27,42 a.*

*"Tit leita eftir Jesusi úr Nasaret, hinum krossfesta; hann er risin upp, hann er ikki her. Hyggið, har er staðurin, har sum teir løgdu hann" - Mark. 16,6 b.*

Langifríggjadagur er ein dapur dagur. Tað tykist sum, at Gud er við at missa valdið, og hin óndi stendur til at vinna stríðið millum ónt og gott í hesum heimi.

Um vit lesa skriftirnar, so síggja vit skjótt, at hetta ikki er so. Tvørtur ímóti er tað Gud, sum í øllum hesum myrkrinum hevur alt valdið. Vit síggja, at allar myrkursins kreftir eru undir Guds harradømi og tæna honum.

Longu tá ið ætlanirnar um at taka Jesus av døgum vóru lagdar, stígur høvuðspresturin Kajfas fram og sigur: "Tit vita als einki, og heldur ikki hugsa tit um, at tað er gagnligari fyri tykkum, at ein maður doyr fyri fólkið, enn at øll tjóðin fer til grundar." Um hetta sigur Jóhannes: Men hetta segði hann ikki av sær sjálvum; men tá ið hann varð høvuðsprestur tað árið, profeteraði hann, at Jesus skuldi doyggja fyri alt fólkið; og ikki bert fyri alt fólkið, men eisini til tess at savna í ein flokk Guds sundurspjaddu børn." Nei, hann segði tað ikki av sær sjálvum, men hann var noyddur, uttan at vita tað, at profetera um Guds frelsu í Jesusi á Golgata.

Eisini hermenninir, sum vóru tilstaðar, tá ið Jesus doyði, vóru brúktir til at staðfesta, at Guds orð, sum talað varð mong hundrað ár frammanundan, gingu út í sínum tíma: "Teir býttu klæði míni millum sín, og kastaðu lut um klædning mín" - Jóhs. 19,24.

Henda dagin, tá ið Jesus varð hongdur á krossin á Golgata, var eingin, ið talaði hansara søk. Jesu vinir tagdu. Flestu lærusveinar hansara vóru flýddir. Vit kunnu lesa, at við krossin stóð móðir hansara og móðursystir hansara, Maria kona Kleopasar, Maria Magdalena og Jóhannes. Hesi vóru tigandi. Nú vóru tað mótstøðumenn Jesusar, ið høvdu orðið.

Øllum haldarum og missiónsvinum burturi og heima verður ynskt einar gleðiligar páskir! Eisini minna vit á, at Kristi Himmalsferðardag, 1. mei gongur talvan í kirkjunum kring landið fyri arbeiði okkara. Sí áheitanum stuðul í blaðnum

Kirkjuliga Missiónsfelagið

Meðan Jesus hekk á krossinum og píndist, mátti hann hoyra háð og spott. "Øðrum hevur hann hjálpt, men sær sjálvum er hann ikki mentur at hjálpa!" Og tey, sum gingu fram við, spottaðu hann. Men tey, sum spottaðu Jesus, vistu ikki, at við teirra spottan, boðaðu tey tað, sum í veruleikanum hendi á krossinum. "Øðrum hevur hann hjálpt, men sær sjálvum er hann ikki mentur athjálpa!"

Jesu vinir vóru flýddir ella stóðu tigandi, men Gud brúkti teir, sum krossfestu og spottaðu hann, til at boða henda sannleika, at Jesus ikki kundi hjálpa okkum og sær sjálvum. Men av kærleika til okkara tók hann revsingina á seg, varð svikin av Gudi og upplivdi glatanina.

## Jesus vildi frelsa okkum.

Tá ið Jesus var staddur í Getsemane urtagarði, gjørdist hann syrgin og tók so sára at kvíða, og hann bað til faðir sín á himli: "Er tað gjørligt, tá lat hesa skál fara um meg, tó ikki sum eg vil, men sum tú vilt." Soleiðis bað hann til faðir sín tríggjar ferðir. Síðani hendir tað, at ein flokkur við svørðum og gøssum koma frá høvuðsprestunum. Ímillum hesar var eisini Judas, sum sveik Jesus.

Ein av teimum, sum var varð við Jesusi, dró svørðið og høgdi annað oyrað av tænara høvuðsprestsins, men Jesus hevði at honum og segði við hann: "Stikk svørð títt aftur í slíðrarnar; tí at allir teir, sum taka til svørðs, skulu falla fyri svørði."

Jesus vildi ikki stríð við hesar, hóast hann kundi gjørt av við teir allar, um hann vildi. Nei, hann vildi ganga tað tungu leið at enda fyri at bjarga okkum, og fyri at skriftirnar skuldu ganga út, at so skuldi verða. Hann var sendur fyri at bjarga okkum frá glatanini vegna synd okkara. Hann var tann

ANDAKT

# Frystar hendur.

Ein dagin las eg um ein gamlan kateket (hjálpar-prest) í Grønlandi, sum lá til tað seinasta. Hann hevði skilt tað, sum mong hava torført við at skilja; tað, at elska Gud við at elska onnur menniskju. Hansara fátæksliga smátta hevði mangan verið skjól hjá einkjum og faðirleysum, sum hann hjálpti við tí, sum hann veiddi.

Nú skuldi hann hiðani. Tey, sum sótu hjá honum, sóu, at hann lá og smíltist. Onkur spurdi, hví hann smíltist; og hann svaraði: "Eg haldi meg kenna tey deyðu børnini aftur, ið eg hjálpti við at verma frystu hendur teirra í mínum hondum".

Hesi orðini siga heilt einfalt hvat, ið ein gudstænasta er: At verma frystar hendur í egnum hondum; at verma fryst hjørtur við at vísa teimum varliga umsorgan.

Frásøgnin um umsorganina, fyri øðrum menniskjum hjá hesum grønlendska veiðimanninum er sum at fáa útlagt Jesusar talu um tað, ið er avgerandi á tí stóra degnum. Á tí degi verður sagt við nøkur: "Komið higar, tit hini vælsignaðu! Tí at eg var svangur, og tit góvu mær at eta; eg var tystur, og tit góvu mær at drekka; eg var ókunnigur, og tit hýstu mær... .so satt sum tit hava gjørt hetta móti einum av hesum minstu brøðrum mínum, tá hava tit gjørt tað ímóti mær"

(les Matt. )25,31-46).

Hetta er júst tað, ið vit í Jesu navni eru sett til: At verma onnur. Tí at hann, sum hevur elskað okkum, og givið okkum lív og frelsu, hann vil, at vit skulu takka og tæna honum júst á henda hátt. At vit í navni hansara verma frystar hendur og fryst hjørtur.

Bert tann í faðirs ríki er, ið kærleik letur ráða, sítt offur letur her á jørð ei vinning eftir gáa. Men fer, tá Harrin kallar hann og takkar at hann fara kann Guds brøðrum glaður tæna.

(DS 323/4)

Týtt úr bókini
"Den Signede Dag"

einasti, sum kundi gera tað, tí hann var syndafríur. “Men hann var særdur vára synda vegna og sundurbrotin vára misgerða vegna; okkum til friðar kom revsingin niður á hann, og av sárum hans fingu vit heilsubót” - Jes. 53,5.

## Jesu uppeisn

“Hann er risin upp, hann er ikki her. Hyggið, har er staðurin, har sum teir løgdu hann.” Soleiðis hevur boðskapurin ljóðað líka síðan hin fyrsta páskamorgun. Hesi orðini skapa av sonnum gleði og lovsong í okkara sál og sinni.

Tað eru tó røddir, ið siga: Deyð menniskju kunnu ikki rísa upp. Hetta stríðir ímóti náttúruni, hugsandi menniskju trúgva ikki slíkum. Men hóast hesar røddir, so eru tað mong menniskju, sum trúgva gleðiboðunum: “Hann er risin upp”. Hví trúgva menniskju á uppreisnina? Paulus sigur til kirkjuliðið í Korint soleiðis: “Tí at eg lat tykkum fáa at vita fyrst og fremst tað, sum eg eisini hava tikið við, at Kristus doyði fyri syndir okkara samsvarandi við skriftirnar, og at hann var grivin, og at hann stóð upp triðja dagin samsvarandi við skriftirnar” - 1. Kor. 3-4. Tað er í ljósinum av tí, sum skriftirnar boða okkum, at vit trúgva og hava vissu um, at uppreisnin er ein veruleiki.

Aftaná ein myrkan langafríggjadag sigur eingilin nú við kvinnurnar: Ræðist ikki! Tit leita eftir Jesusi úr Nasaret, hinum krossfesta; hann er risin upp, hann er ikki her.”

Hjá okkum er heldur ikki grund at óttast, tí at Jesus, sum doyði fyri tína og mína synd, er risin upp og livir. Grøvin er fortíð, men páskamorgun er nútíð og framtíð, og eins og Jesus reis upp, soleiðis skulu eisini øll tey, sum trúgva á hann, rísa upp og liva saman við honum.

Tá Jesus gekk her á foldum, var hann eisini kallaður: tollara og syndara vinur, og tað *var* hann. Hann møtti syndarum við orðinum um syndanna fyrigeving. Vit lesa mangar ferðir í Bíbliuni hesi orðini: syndir tínar eru tær fyrigivnar, og menniskju vórðu sett í frælsi og fingu eitt nýtt lív. Jesus tók eisini hesi menniskjuni til sín. Tey flokkaðust um hann og møttu kærleika og hita frá honum, hóast heimurin helt lítið um tey og metti tey fyri einki.

Hetta var ikki nakað, sum bert hendi tá, nei, Jesus livir í dag og er enn tollara og syndara vinur. Hansara kærleiki til øll tey, sum kenna seg dømd av síni synd, kenna, at lívið hevur ikki verið livað so, sum tað átti. Tey møta eisini hesum vælsignaðu orðunum: syndir tínar eru tær fyrigivnar, komið til mín, eg vil geva tykkum hvílu.

Tí er spurningurin til okkum; hava vit takka Jesusi fyri frelsuna, sum hann vann okkum við sínum dýrabara blóði á Golgata?

Hetta er tað einasta, vit kunnu gera, tí revsingina fyri okkara syndiga lív tók Jesus á seg. Heilagur, rættvísur og syndafríur, gav hann lív sítt sum bót fyri allar syndirnar. Seinastu orðini, Jesus segði, áðrenn hann doyði, vóru hesi: “Tað er fullgjørt!”

Eg haldi, at Hans M. Jacobsen greiðir okkum so sera væl frá í einum av sálmum sínum, hvat tað var, sum hendi, tá ið frelsarverkið varð fullgjørt á Golgata.

“Tað fullgjørt er!” o, gleðiboð,
tað Jesus er, ið talar so;
fullgjørt hans kærleiksverk nú er,
sum syndatrælir fríar ger,
fullgjørt, ei nakað meir skal til,
Gud offur hans góðkenna vil.

So fullan sigur Jesus vann,
at synd mín ei meg skaða kann,
er hon enn stór og mikið svørt,
tí Jesu verk tað er fullgjørt;
fullgjørt;
tað er at bjarga mær,
sum annars deyðadømdur var.

Tú, sum tær sjálvur bjarga vilt,
títt strev og stríð, tað er alt spilt,
tú kanst ei sjálvur bjarga tær,
men Jesus tínar syndir bar,
fullgjørt hans verk til lítar er,
lít fast á tað og frelstur verð.

Tú, sum tær einki føri sært,
tí syndin nívdi teg so hart,
for teg er Jesu verk fullgjørt,
tín synd, er hon enn kolasvørt,
hon kann ei døma teg um bert
í trúgv til Jesu kross tú fert.

Takk, Jesus, fyri verkið tað,
fullgjørt varð langafríggjadag,
fullgjørt var fyri syndarum
til sálarbótar øllum, sum
í trúgv tað vilja líta á
og syndafyrigeving fá.

(MS 157)

Jákup Olsen
skrivar

# Talentirnar

## Matt. 25, 14 - 30 Úr bókini Sæden er Guds ord hjá Øjvind Andersen

Suni Jacobsen,
týðir.

Neyvan er nakað av líknilsum Jesusar vorðið so misskilt og misnýtt sum hetta. Tað hevur verið nýtt til at tala um alt møguligt í mannalívinum. Hetta kemst av, at ikki hevur verið skettað eftir, hvørjum samanhangi tað stendur í. Skettað verður ikki eftir hvønn tað veruliga er sum Jesus talar við, og hvat hann í veruleikanum talar um. Uppgáva okkara er tí at royna at hyggja gjøllari at hesum.

Parturin av Matteus-Evangeliinum sum hetta líknilsi er tikin úr (24,1-25, 46) er seinasta frálæra av lærusveinum sínum, áðrenn hann fyri seinastu ferð heldur leiðina til Jerúsalems, til tess at doyggja og fullgera frelsuna. Hann talar um oyðing Jerúsalems og um tey seinastu ting. Hann talar um tær hendingar ið koma skulu uppundir enda tíðarinnar. Hann talar um afturkomu sína og endar 24. kap. við at tala um at vaka og biðja og týða tey seinastu tekinini. Síðan fer hann í 25. kap. fyrst at tala um hjartaviðurskifti teirra kristnu í líknilsinum um tær tíggju brúðarmoyggjarnar, og síðan í okkara parti ørindi 14-30 talar hann um tað røttu framferðina í væntanini av afturkomu síni. Líknilsið um talentirnar er sostatt tala Jesusar til teirra trúgvandi um rætta háttin at bíða eftir afturkomu hansara. Jesus samanber seg við ein mann, ið ætlar sær uttanlands, tí kallaði hann til sín tænarar sínar og gav teimum tað hann átti upp í hendi, at umsita.

Hann hevði eina heilt ávísa ætlan við hesum. Hann ætlaði, tá hann kom aftur, at heysta, har hann ikki sáaði og savna, har hann ikki stroyddi. Tænarar hansara skuldu sáa og stroya har. Tá Jesus var her á foldum, hevði gerningur hansara fast tilknýti at Ísrael.”Eg eri ikki sendur út uttan til teir burturvilstu seyðirnar úr Ísraels húsi (Matt 15).

Men Jesus lovaði, at tað skuldi verða øðrvísi, eftir at hann var vorðin upphevjaður frá jørðini, tað vil siga krossfestur, eftir at frelsan var fullgjørd. Tá skuldi hann draga allar til sín. (Jðh.12)

Jesus sáaði til dømis ikki í Føroyum, Etiopia, Tansania ella aðrastaðni, meðan hann gekk á fold. Men tá hann kemur aftur, fer hann at heysta inn á hesum og øllum øðrum støðum. Jesus fer júst at heysta inn har hann ikki hevur sáað og savna har hann ikki hevur stroytt. Tað er okkara uppgáva, sum lærusveinar Jesu, at gera hetta, og Jesus hevur givið okkum tað fæfeingið, ið geva skal rentu, og breiða ríki Guds út her á jørð.

Talentirnar eru ikki ein mynd av náttúrugávum, evnum, handalag, viðføddum fyritreytum ella øðrum. Tær eru heldur ikki mynd av náðigávunum: arbeiðs-útbúgving sum Gud gevur trúgvandi menniskjum. Einki er so vist sum tað, at vit, sum kristin, skulu standa í Harrans tænastu bæði við náttúrugávum og náðigávunum okkara. Men hesar náttúru-og náigávur eru ikki rakstrarpeningurin í Guds ríki - fyri at halda okkum til myndina. Í líknilsinum stendur, at Harrin leit tænarum sinum ogn sína at umsita. Tað er júst myndin uppá hvat Jesus hevur gjørt mótvegis sínum trúgvandi. Hann hevur jú latið okkum ogn sína í varðveitslu. Í høvuðsprestabøn síni Jóh. 17,22 sigur Jesus: “Og dýrdina sum tú hevur givið mær, havi eg givið teimum.” Jóhannes apostul vitnar og sigur: “Vit skoðaðu dýrd hansara, dýrd sum einborin sonur hevur frá faðir sínum.” (Jóh. 1,14) Jesus hevur givið okkum sítt egna orð, og í hesum orði hevur hann givið okkum seg sjálvan, við allari dýrd síni. Vit hava fingið barnakor Jesusar, arvarætt Jesu, atgongd Jesusar til Faðirin; bønina í Jesu navni og mangt annað. Vit eru vorðin Guds arvingar og samarvingar Jesu Krists, vit, sum trúgva á hann. (Róm. 8,17). Sanniliga hava vit fingið nakað, sum eingi onnur menniskju á jørðini hava fingið. Tí eru talentirnar júst ein mynd av tí, sum tey kristnu eiga, og sum eingi onnur menniskju eiga. Men um somu tíð eru tær ein mynd at tí, sum breiðir út Guds ríki, ta útbreiðslu sum tey kristnu hava ábyrgdina av, við atliti til Jesu afturkomu. Vit kunnu eisini lýsa hetta við øðrum orðum Jesusar. Í høvuðsprestabønini sigur Jesus við Faðirin hesi orð um lærusveinar sínar: “Eg havi givið teimum orð títt, og heimurin hevur hata teir, av tí at teir ikki eru av heiminum, eins og

eg ikki eri av heiminum. Ikki biði eg, at tú skalt taka teir burtur úr heiminum, men at tú skalt varðveita teir frá tí illa.” (Jóh. 17, 14-15) Framvegis sigur hann í somu bøn til Faðir sín á Himni: “Eins og tú hevur sent meg í heimin, soleiðis havi eg eisini sent teir í heimin.” (Jóh. 17,18) Uppaftur síggja vit í Jóh. 17,20, at tað er við hesum boðskapi, sum Gud hevur givið, at Guds ríki breiðir seg. “Men eg biði ikki eina fyri hesum, men eisini fyri teimum, sum fyri orð teirra fara at trúgva á meg.” Tað sama kemur fram aftur í tí, sum Jesus sigur við lærusveinar sínar aftaná uppreisnina, men tað verður ov drúgført at viðgera í hesum sambandi. Tey sum trúgva á Jesus, standa rein frammanfyri Gudi av tí orði, sum Jesus hevur tala til teirra. (Jóh. 15,3) . Við hesum orði eru vit, sum trúgva, frelst og hava ævigt lív og barnakor hjá Gudi. Vit eru øll Guds børn við trúnni á Jesus Kristus, sum sagt verður móti endanum á brævinum til Galatamanna. Tað merkir, at øll kristin eru eins nógv frelst. Tað er løgið at hugsa sær, men satt er tað eftir Guds orði. Vit hava sama rættvísi fyri Gudi, sum Paulus og Jóhannes høvdu. Við øllum brekum okkara eru vit heilag, ólastandi og órevsiverd fyri Guds ásjón, orsakað av sóning Jesu Krists fyri syndum okkara. Har er tað sama galdandi fyri øll kristin. Hvat merkir so tað, at ein hevur fingið fimm talentir? Hóast vit, sum kristin, eiga somu frelsu og ta somu rættvísi fyri Gudi, hava vit ikki sama ljós yvir ta frelsu vit eiga. Vit hava sum kristin ikki fingið eins nógv at umsita. Vit kunnu til dømis uttan nakað viðganga, at Jóhannes og Paulus høvdu ómetaliga nógv meira ljós yvir frelsuna, enn vit hava.

Um hetta verður mangan sagt, at summi hava fingið nógv, meðan onnur hava fingið lítið. Hetta er ein vandamikil háttur at síggja hetta uppá, og tað samsvarar als ikki við hetta líknilsi. Tann ið fingið hevur minst, hevur fingið eina talent. Skulu vit hyggja at hesum úr einum jarðiskum sjónarhorni, noyðast vit at viðganga, at tann, ið fingið hevur minst, kortini hevur fingið eina risaupphædd. Ein talent í silvuri svarar til tað sum ein menniskja við vanligari ársløn kundi forvunnið í 20 ár. Tað er ein øðilig upphædd. Var tað ein talent í gulli, hevði upphæddin verið ørandi. Tann ið hevur fingið minst, hevur sostatt fingið eina risaupphædd. Tað minsta ein kristin veit, er hetta: Jesus doyði fyri meg. Jesus hevur bøtt fyri syndir mínar. Er tað ikki ein stór upphædd samanborið við tey, ið einki vita um hetta?

Skulu vit síggja hetta frá teirri himmalsku síðuni, mega vit siga, at sjálvt tann, ið fingið hevði mest, hevur fingið lítið, samanborið við tað, hann fær at síggja, tá hann kemur inn í tað fullkomna Guds ríki. Tí kann Jesus siga við tann við teimum fimm talentunum: “Tað var væl gjørt, tú góði og trúgvi húskallur! Tú vart trúgvur yvir lítlum, eg vil seta teg yvir nógvum. Far inn til gleði harra tíns.” (Matt. 25,21) Tað er stórur munur millum okkum kristnu, hvat ljós vit hava yvir Guds orði, men vit eiga øll lut í einum ríkidømi og eini “ognarupphædd” sum eingi onnur hava, enn tey, ið eiga gleðiboðskapin og kenna Jesus.

Tann ið fingið hevði tær fimm talentirnar, fór beinanvegin út at handla við teimum, og vann sær aðrar fimm. Í grundtekstinum verður her nýtt ein løgin málbering: Hann fór burtur og setti tær fimm talentirnar at arbeiða. Tað er ikki okkara avrik, men Guds egna orð ið fremur verkið í Guds ríki. Á sama hátt var tað við honum við teimum tveimum talentunum. Talentirnar arbeiddu, og úrslitið svitaðist ikki. Tá ið húsbóndin kom aftur at halda roknskap við teir, vísti seg, at úrslitið svaraði til tað, teir høvdu fingið, og tá er tað at harri teirra sigur við teir: Tað var væl gjørt, tú góði og trúgvi húskallur! Tú vart trúgvur yvir lítlum, eg vil seta teg yvir nógvum. Far inn til gleði harra tíns.”

Ein kristin, sum er trúgvur í gerningi sínum fyri Jesus, heldur kanska ofta sjálvur, at lítið kemur burturúr tí, sum hann fær náði at avrika. Men tað er kortini nógv størri, enn hann sjálvur heldur. Guds orð ber altíð ávøkst, og tað festir ofta røtur, har tú minst av øllum væntaði tað. Eitt evarska lítið orð, sagt í røttu løtu og á røttum stað, hevur verið til frelsu hjá mongum menniskja, og hetta menniskja er aftur vorðið eitt amboð til at frelsa mong onnur.

Mangt eitt ungt menniskja hevur kent, at Harrin kallaði tað til kristniboðara, og tók við kallinum. Sjálvt helt tað seg ikki hava nakað at fara út við, men tað fór í Jesu navni. Úrslitið gjørdist mangan stórfingið, hóast tað ikki helt seg megna at gera tær stóru skreytirnar.

Men orð Guds, so satt tað er Harrans egna orð, vit bera fram, vendir ikki tómt aftur. So satt tað er orð ið gingið er út av Guds munni, og ikki okkara egnu tankar vit boða, so vendir tað ikki tómt aftur, men fremur lukkutíð tað, sum Gud hevur sent tað út at fremja. Á tí stóra degi, tá gerast skal upp, fer tað at vísa seg, at tað sáð, sum Harrin gav okkum at sáa, hevur verið kraftamikið og hevur borið ávøkst. Men her er eitt álvarsamt orð í hesum líknilsi. Tvær ferðir stendur eitt “Men” . í báðum førum er hetta sett í samband við hann við teirri einu talentini. Hann fór ikki út at tingast ella at handla við hesi talent. Hann var ógvuliga stúrin fyri at missa talentina, og var sera umhugsin í at ansa eftir henni,so hann kundi

lata harra sínum hana óskalaða, tá hann kom aftur. Hann fór tí út og gróv eitt hol í jørðina at goyma peningin hjá harra sínum í. Hetta gjørdu tey fyrr í tíðini í Eysturlondum og í Miðeystri, og gera tað nógvastaðni enn. Eins og fólk nú á døgum fara í bankan at fáa sær eitt trygdarskáp til leigu, at goyma virðislutir sínar í, soleiðis funnu tey sær úti á víðavangi eitt loyniligt stað, har tey kundu grava niður tað tey vildu varðveita. Staðið visti eingin um, men sjálvi kundu tey altíð finna tað aftur. Tey ballaðu tað ið goymast skuldi inn í eitt tilfar ið toldi at liggja niðurgrivið. Hetta kundi so liggja í langa tíð, og kortini gravast uppaftur í sama standi sum tað varð lagt. Soleiðis gjørdi tænarin við sína einu talent.

Hvat er hetta í veruleikanum ein mynd av.? Tað avmyndar kristin fólk, ið óttast at missa kristnitrúgv sína. Tey ansa væl eftir henni. Tey verða fús at stíga fram sum kristin á tí eina degi, men tey vilja ikki ofra nakað, líða nakað ella tola fordøming og aðrar trupulleikar vegna gleðiboðskapin. Tey vilja ikki gera nakað, fyri at orðið um Jesus kann verða borðið víðari. Harrin dómfellur henda tænaran og sigur við hann: “Tú illi og lati húskallur! Tú visti at eg heysti inn, har sum eg ikki sáaði, og savni saman, har sum eg ikki stroyddi.” Hann hevði onga umbering fyri ikki at hava gjørt nakað, til tess at henda talentin skuldi kunna geva avkast. Og so sigur Jesus nakað, í hesum samanhangi, sum tykist heilt løgið: “ Tú átti at hava sett peningar mínar inn hjá peningavekslarunum, so hevði eg, tá eg kom heim, kunnað fingið mítt aftur við rentu.”

Hvat kann hetta vera ein mynd av.? Hetta við peninga-vekslurunum. ? Í roynd og veru eru vekslararnir kristniboðarar okkara og tey ið bera orðið fram okkara millum. Liggur tað einum ikki raði at gera so nógv, hvørki at prædika, læra frá sær ella á annan hátt breiða út Guds orð, so er tørvur á slíkum ið kunnu standa aftanfyri og stuðla teimum, sum í orðsins rætta týdningi eru vekslarar okkara í Guds ríki.

Jesus talar enntá um, at vit við hinum órættvísa mammon - peninginum - kunnu vinna okkum vinir ið kunnu taka ímóti okkum, tá vit koma hagar. Vit kunnu nýta pening okkara soleiðis, at menniskju verða frelst orsakað av stuðli okkara til teirra ið bera orð Guds longur út í heimin, til frelsu sálanna.

Tað endaði galið hjá honum við teirri einu talentini. Hann hevði ansað væl eftir henni, og hann kundi handa harra sínum hana, tá hesin kom aftur. Men kortini endaði galið. Tað fær ringan enda hjá teimum, ið bert hava tað endamál, at varðveita sín egna kristindóm inni hjá sær sjálvum.

Tann ið ikki vil gera nakað, ofra, ella tola ilt, fyri at onnur skulu verða frelst, hann er ikki førur fyri at verða verandi kristin. Skulu vit verða varðveitt í trúnni á Jesus, er neyðugt at gera nakað til tess at leiða onnur til Jesus! Samanumtikið viðvíkjandi hesum líknilsinum: Hví liva vit á hesi fold sum kristin.? Tað er ikki fyri at gerast búgvin til Himmalin. Tí, frá fyrstu stund, vit tóku ímóti Jesusi, vórðu vit búgvin til Himmalin. So sum ránsmaðurin á krossinum, saman við Jesusi gekk inn í Paradís, frá teirri stund hann vendi sær til hansara. Unnist okkum at liva til Jesus kemur aftur, og vit verða halga, hava vit einki annað at fara inn í Guds ríki við enn tað, sum ránsmaðurin á krossinum fór inn í Himmalin við. Vit eru búgvin til Himmalin frá teirri stund vit verða frelst. Tað er ikki tí vit liva sum kristin. Men vit kunnu ímynda okkum støðuna, um Jesus hevði tikið lærusveinar sínar við sær inn í Himmalin, so títt og knapt frelsan varð fullgjørd. Tá høvdu ikki fleiri menniskju verið frelst. Tí sigur Jesus við teir: “Eins og faðirin hevur sent meg, soleiðis sendi eg tykkum.” (Jóh. 20.21, samanber 17.18). Jesus hevur tørv á nøkrum her í heiminum, sum kunnu bera orðið um hann út millum fólk, soleiðis at Jesus kann síggja ávøkstin av fullgjørda verki sinum á Golgata. Vit liva sum kristin her í heimi, fyri at Jesus skal síggja ávøkst av fullgjørda verki sínum. Tann kristni ið hevur hesa áskoðan, kann við gleði bíða eftir komu Jesusar.

# Ætlanin við lívinum

Kristian Thorleifsson
Týtt

Hvat kunnu vit svara øllum teimum ólukkuligu menniskjunum, sum ikki kunnu síggja nakra ætlan við lívinum. Er yvirhøvur nakað svar at geva teimum — ella okkum øllum — sum standa andlit til andlit við veruleikan, at vit liva í einari vónleysari verð, har deyðin altíð er endin.

Tað er ikki satt, tá summi siga, at vit eru komin frá apunum. Alt er ikki vorðið til av sær sjálvum. Lívið er ikki komið av tilvild, sum Darvin vildi vera við. Ein slík hugsan er høpisleys, tað vísir seg, um ikki við skrivaraborðið við gardinunum fyri, so í øllum førum, tá ið tú stendur andlit til andlit við veruleikan, at hugsa sær til, at jørðin er oasan í rúmdini, at natúran við øllum sínum plantum og djórum, har alt er lagað hvørt eftir øðrum, og menniskjan við sínum ófatandi likamligu evnum, at alt hetta skuldi verið uppkomið av sær sjálvum, av tilvild, tað er ógjørligt. Hetta er bert ein ynskidreymur um at gera Gud til einkis. Og tað er júst tað, ið tann sjálvmótsigandi útviklingslæran er, ein læra, sum bert byggir á *gitingar.* Nei, sannleikin er ein annar, Gud hevur skapað alt, hann hevur skapað bæði himmal og jørð, tað gjørdi hann í fyrstani. I sálma 33,9 lesa vit: »Tí hann talaði, og so varð; hann beyð, og so tað stóð.« Og Gud hevur eisini skapað teg, tú ert útgingin av hansara almáttugu hond.

Soleiðis var tað við teimum fyrstu menniskjunum á jørðini. Í 1. Mós. 1,27 lesa vit: »Og Gud skapaði mannin eftir síni mynd, í Guds mynd skapaði hann, sum kall og konu skapaði hann tey.« Á sama hátt er tað við tær. Gud Harrin hevur evnað teg til. Les sálma 139,13—18.

Hugsa tær til, at tað er eisini Gud, sum heldur øllum uppi, og heldur alt í gongd, einki kann standa av sær sjálvum, alt avhongur av Gudi. Tað er Gud sum syrgir fyri at jørðin melur um sólina og mánin melur um jørðina, at tað regnar, og at vatnið aftur fordampar og aftur kann regna á jørðina. Hann stýrir tíðini, ár, dagar, tímar, minuttir, sekund.

Alt hevur sína orsøk í Gudi, alt lívið eisini, tað at tú ert til í hesi løtu. Næstu ferð tú andar, næsta hjartaslag títt, alt avhongur av Gudi, tí hevur lívið eisini eina ætlan.

Tú ert ikki føddur bert fyri at doyggja. Lívið kann bjóða uppá nógva sorg og vónbrot. Nógv fólk á jørðini líða neyð, tey hava ikki nóg mikið av mati og eru plágaði av sjúkum. Tað eru eisini nógv sum líða andaliga neyð. Tey kenna ikki Gud á tann hátt, at hann hevur opinberað seg til frelsu í Jesusi Kristi

Men eingin menniskja er fødd inn í henda heim fyri at hon skal uppliva alt tað ónda, verða pínd og plága og annað, heldur ikki tú. Gud hevur skapað teg og letur teg liva bert av einari orsøk, tí hann vil gleða teg. Hann vil, at tú skalt uppliva tað ríkidømi og gleði, ið er at liva í felagsskapi við hann, og av fríum vilja tæna honum, nú og altíð.

Soleiðis var tað eisini tá alt byrjaði. Á skapanar morgni var alt sera gott, alt var skapað til sítt endamál, skapað av Gudi sjálvum.

Men so kom syndafallið og oyðilegði alt, menniskjan gekk sínar egnu vegir, og alt fór av lagi, syndin førdi banningina við sær, men Guds hjartalag broyttist ikki. Hann uppgav ikki sína ætlan við at gleða menniskjur, sum hann hevði skapað í síni egnu mynd. Hann sendi sín egna son, Jesus Kristus, fyri at gera alt gott aftur, sum var oyðilagt.

Hví ert tú til?

Gud vil hava felagsskap við menniskjuna, tí sendi hann okkum Jesus, fyri at vegurin aftur skuldi vera opin inn til hansara.

Bíblian sigur, at hetta longu var avgjørt áðrenn heimsins grundvøllur var lagdur. I Ef. 1,4—5 lesa vit: »líkasum hann útvaldi okkum í honum, áðrenn grundvøllur heimsins varð lagdur, at vit skuldu vera heilagir og lýtaleysir fyri ásjón hansara, við tað at hann frammanundan í kærleika ætlaði okkum til at hava barnakor hjá sær sjálvum fyri Jesu Krists skuld, samsvarandi góðtokka vilja síns.«

Hetta er av sonnum undrunarvert, tí tað merkir, at Guds sanna mál, við at skapa verðina og allar lutir, í veruleikanum var at fáa felagsskap við menniskjuna. Guds skaparverk skal so at siga tæna Guds frelsuverki.

Men harvið er eisini nakað avgjørt um ætlanina við mannalívinum. Einki í lívinum er eitt mál í sær sjálvum, hvørki nakað

av tí, sum hendir í barndóminum, ungdóminum, manndóminum ella aldurdóminum. Nei, alt tað, sum Gud skapti, alt í lívinum, skal tæna tí máli, at menniskjan fær felagsskap við Gud. Tað er eisini tað bíblian sigur. í áps. 17,24—27 lesa vit: »Gud, sum gjørdi heimin og alt, sum í honum er, hann sum er harri himins og jarðar, býr ikki í templum, gjørdum við hondum; ikki heldur verður honum tæna av mannahondum, sum at honum skuldi verið tørvur á nøkrum, tí at hann sjálvur gevur øllum lív og anda og allar lutir. Og hann hevur latið øll fólk av einum blóði búgva um allan jarðarkringin og tilskilað teimum fyrisettar tíðir og markini fyri bústaði teirra, so at tey skuldu leita eftir Gudi, um tað kundi verða, at tey kundu trilva seg fram og finna hann, tó at hann kortini ikki er langt burtur frá nøkrum einasta av okkum.«

Ja, tá verðin stendur enn í dag, so er grundin bert tann, at Gud vil frelsa. Í 2. Pæt. 3,9 lesa vit: »Ikki drálar Harrin við fyrijáttanini, soleiðis sum summir halda tað fyri eina drálan; men heldur er hann langmóðigur við tykkum, av tí at hann ikki vil, at nakar skal glatast, men at allir skulu koma til umvendingar.«

Tú ert skapaður fyri at liva, tí Gud vil hava felagsskap við teg. í 1. Tim. 2,4 lesa vit: »Gud vil, at øll menniskju skulu verða frelst og koma at kenna sannleikan.«

Ja, tú ert til fyri at tú skalt taka ímóti Guds gávu, uttan nakrantíð at skula gjalda fyri hana, hava barnakor hjá Gudi, sum skrivað stendur í bíbliu okkara.

Hetta er Guds ætlan við tær, og við øllum menniskjum. Hann vil, at tú skalt móttaka hansara kærleika og góðsku bæði her og nú og í ævir. Tað hevur hann avgjørt í síni ófatiligu náði. Tí ert tú til.

Hygg bert eftir Guds ríka skaparverk, blómurnar, trøini, fuglarnir, djórini, fiskarnir. Ver stillur eina løtu og hygg upp í himmalin, ófatilig nøgd av stjørnum. Og hugsa um alt tað ófatiliga, sum Gud hevur skapað, og hann hevur skapað tað fyri at gleða menniskjuni, hansara høvuðsskapningur. Vit hava loyvi at gera brúk av tí, og gleða okkum um tað.

Hvussu nógva orku hevur tú, persónliga, og saman við øllum øðrum ikki fingið at ráða yvir sálarliga, likamliga og tímiliga. Jú, sanniliga, Gud er stórur og góður.

Tí er lívið ein óendaliga rík gáva, ið ikki kann sammetast við nakað annað. Tað er givið tær frá skaparanum í hansara ófatiliga vísdómi, góðsku og kærleika. Hugsa tær, at hann vildi geva júst tær tað.

Tú hevur í veruleikanum orsøk til at takka fyri, at tú livir. Tað verður sagt um hin týska prestin og mótstøðumannin Dietrich Bonhoeffer: »Hann var ógvuliga takksamur fyri tann nakna veruleika, at hann livdi, og kundi gleðast yvir hvørja minstu hending.« Eitt slíkt takksemi og gleði yvir lívið er á góðari leið. »Hvør dagur er ein sjáldsom gáva.« Mads Nielsen.

Men! — Ja, tað er eitt stórt men! Tí tað er ein ætlan við lívinum, sum vit hava hoyrt um, tað er eingin sjálvvirkandi sáttmáli við Gud, og tað er eingin av okkum, sum hevur tað uttan víðari. Tvørturímóti. Tí vit eru øll fødd sum nei-sigarar til Gud, — sum fíggindar av honum, hetta er lívsins álvara.

Í veruleikanum liva tey flestu menniskju í andstøðu við lívsins ætlan. Tað kennist svárt at noyðast at viðurkenna tað, nøkur vilja kanska ikki viðurkenna tað av stoltleika, ella dømandi, at hugsa sær til, at so nógv menniskju skulu fara skeiv, tað ljóðar heilt ótrúligt.

Tað er tó sannleikin. Soleiðis hevur tað verið allar tíðir, og tað er ein vónleys støða, menniskjan livir ikki í røttum samfelagi við Gud, og fær ikki lut í ætlanini við lívinum.

Men hetta nýtist ikki at vera soleiðis fyri nakran av okkum. Gjøgnum Jesus kunnu vit koma í rætt samfelag við Gud, sum skrivað stendur: »Í honum (Jesusi) hava vit (t.v.s. øll sum trúgva á Jesus sum Frelsara) endurloysingina í við blóði hansara, fyrigeving syndanna, samsvarandi náðiríkidømi hansara.« Ef. 1,7. Og fyrigeving syndanna merkir jú, at tey vánaligu viðurskiftini við Gud nú eru í lagi aftur. Um tú trýrt á Jesus, tá ert tú í veruleikanum komin í sáttmálan við ætlan lívsins, tí tú ert í røttum viðurskiftum við Gud, ætlan Guds er fullførd við tær, og við tí verður Gud æraður.

Tað er ein djúpur samanhangur ímillum ætlan lívsins og æru Guds, tað at Gud verður æraður er í veruleikanum endamálið við øllum sum Gud ger, sigur bíblian.

Til dømis stendur um skapanarverkið í sálma 19,2: »Himin boðar hátign Guds, hans handaverk hválvið ger kunn.« Guds æra var eisini endamálið, tá Gud leiddi Ísraels fólk út úr Egyptalandi. »Soleiðis leiddi tú fólk títt og vann tær dýrdarmikið navn.« Jes. 63,14. Sama er við øllum Guds góðgerðum. Til dømis tá sagt verður hvussu tey rættvísu búnast undir Guds góðu hond. Í sálma 92,16 lesa vit: »Til tess at lýsa, at Harrin rættvísur er, at hjá kletti mínum eingin órættur er.« Gud verður æraður við

hesum.

Ikki minst er sjálv frelsan Guds æra. í sambandi við Guds frelsuætlan frá byrjan av, frelsan sum kom til menniskjuna, stendur ofta: Í Ef. 1,6—12—14 lesa vit: »Til prís fyri dýrdar náði sína, sum hann náðaði okkum við í hinum elskaða, v. 12: Fyri at vit skuldu vera dýrd hansara til prís, vit, sum frammanundan høvdu sett vón okkara til Krists. v. 14: Hann sum er pantur um arv okkara, til endurloysingar av ognini, dýrd hansara til prís.«

Tað er við øðrum orðum endamálið við tilveruni, og ætlanin, at Gud skal verða æraður. Tí er tað bert tað, sum hevur hetta endamál, sum gevur nakra meining.

Men er tað so ikki líkamikið, hvat menniskju gera dagliga, bert vit av og á biðja til Gud og siga honum tøkk? Nei, tí tað at æra Gud hevur við tað vanliga mannalívið at gera. At æra Gud, er ikki bert ein spurningur um at biðja til hansara og syngja honum lovsong. Tað er eisini — og ikki minst — ein spurningur um, at vera har, sum Gud vil hava okkum at vera. Tí kunnu vit í bíbliuni lesa, at sjálvt deyð ting sum sólin, mánin og stjørnurnar kunnu æra Gud. »Tey skulu lova Harrans navni, tí eftir boði hans vórðu tey skapað.« Sálm. 148,5. Hvussu kunnu sól, máni og stjørnur prísa Gudi, tá ið tey hvørki kunnu tosa ella syngja? Frágreiðingin kemur beint aftaná, vers 6: »Og hann tey festi um aldur og ævir, hann gav teimum lóg, sum ikki tey bróta.« Tey deyðu tingini æra Gud við at vera har, sum hann vil hava tey í ætlan síni.

Hetta er eisini galdandi fyri menniskju, vit æra Gud við at vera har, sum hann vil hava okkum at vera,. Við at fylgja vilja hansara við lívi okkara.

Tað er eitt samband ímillum tað, at æra Gud, og so tað, at standa í sínum starvi, í tí gráa gerandisdegnum, tá alt sær so vónleyst út.

Skaparin hevur givið tær eitt pláss, sum bert tú kanst útfylla. Gud hevur eina ætlan við lívi tínum.

Tað er ikki av tilvild, at tú er føddur og livir í 21. øld. Gud hevur eina ætlan við tí, at tú ert til. Hann vil, at tú einaferð skalt uppliva ein fullkomnan felagsskap við hann í ríki sínum. Og fyri at hetta skal henda, vil hann, at tú longu her og nú kemur í samband við hann, við trúgv á Jesus, og livir eftir hansara vilja, glaður og takksamur fyri at fáa loyvi at vera hansara, og at enda koma heim í himmalin.

Hetta letur bíblian upp fyri okkum. Tað gevur eitt grundstøði at byggja á, sum er nóg sterkt til at føra okkara lívsbát ígjøgnum aldudalin í hesari ofta (í okkara eygum) høpisleysu verð.

Ja, tá alt kemur til alt, er bíblian tað einasta veruliga grundstøðið, sum kann halda einum menniskja uppi, í gleði og sorg, viðgangi og mótgangi, í ljósum og myrkum tíðum.

Við tí kunnu vit liva lívið í hesi deyðans verð.

Úr bókini: *»Lev livet«*
*Claus L. Munk.*

Kristian Thorleifsson
Týtt

## Høvi at stuðla!

**Krists himmalsferðardag ella ein av døgunum um ta tíðina verður savnað inn í kirkjunum kring landið til arbeiðið hjá Kirkjuliga Missiónsfelagnum.**

Sum kunnugt er virksemi okkara økt seinastu árini. Peter O. K. Olofson er sendur út til tænastu í Tansania. Aftanfyri tey standa Luthersk Missions-forening og Kirkjuliga Missiónsfelagið. Peter skrivar javnan heim og greiðir okkum frá tí gerningi, hann stendur í. Vit kunnu gleðast um, at tað gongst honum væl í tænastuni sum undirvísari á Teofilo Kisanji University í Mbeya.

Eisini er møtivirksemið heima økt og samskipað.

Harumframt eru vit framvegis við í missiónsarbeiðinum í Etiopia, har vit hava fíggjarligu ábyrgdina av bíbliuskúlanum í Arba Minch. Samstarvið við Norea Radio um tvær útvarpssendingar til Kina um vikuna heldur eisini fram.

Vit gleðast um og takka Gudi fyri, at vit fáa loyvi at vera við í hesi tænastuni at rætta menniskjum, bæði heima og úti, gleðiboðskapin um eina fullgjørda frelsu fyri Jesu skuld. Vit takka eisini tykkum, góðu missiónsvinir, fyri trúfesti í tænastuni. Takk fyri forbøn og offur.

Økt missiónsvirksemið merkir, at meira peningur skal til at reka okkara missiónsarbeiði. Tí fara vit at biðja um eina góða gávu Krists himmalsferðardag.

Um tygum ikki hava møguleika at vera í innsavningini, ber til at nýta viðlagda girokort ella flyta á kontu 9181-495.337.3 í Eik Banka. Ella á konto í Føroya Banka 6460 - 4950536

Við heilsan
Kirkjuliga Missiónsfelagið
Stýrið

BRÆV

# Nærkontaktbrev nr 15, d.11.12.2007

Peter Olofson skrivar

## Positivt

*Det er positivt at være negativ* – i hvert fald en gang imellem. Der var gratis HIV test på TEKU for nylig, og jeg spurgte i en klasse, om de ikke skulle hen og testes. Jeg vil ikke sige, at der lød et samstemmende højlydt ja fra klassen, der var måske snarere stilhed eller nogle, der trak lidt på det. Signalerede man ikke et eller andet om mulig utroskab, hvis man lod sig teste eller hvad, og var det ikke bedre, om så skulle være, at leve i uvidenhed. Og hvis man blev syg, kunne Jesus så ikke blot helbrede (alvorligt ment eller ej, så blev det rent faktisk sagt). Osv.osv.

Når man lever i den del af verden, hvor der er flest HIV positive; mange, der dør pgra AIDS og mange forældreløse børn af samme grund, så kan man spørge: Hvad kan vi gøre? En god ting er at kende tingenes faktiske tilstand. Uvidenhed om tingenes faktiske tilstand, kan rent faktisk være med til at forværre situationen. Og ved at lade os teste, så kan vi måske give et eksempel til efterfølgelse, der kan være med til at afskaffe uvidenheden om tingenes faktiske tilstand. Så Robert, Kristiane og jeg gik over og lod os teste, og så gik vi en viftetur med vores AIDS-test kort, og kunne da heldigvis også møde nogle teologi-studerende, der havde ladet sig teste. Det kunne selvfølgelig blive lidt selvretfærdigt det her, men selv på trods af selvretfærdighedens fare, så kommer vi ikke uden om, at hvis vi – også som hvide – lod være med at gå, så satte vi også et eksempel ved det.

## TEKU

I dette semester har jeg haft et introduktionskursus til teologistudiet, et kursus i dogmatik og to kurser i konfessions-kundskab (læren om de forskellige kirkesamfund). Det er *en positiv udfordring* at få lov til at være med til at uddanne og dermed også forme nogle af fremtidens præster. Vel er LM's udsending kun en blandt mange, men reelt må vi nok sige, at der ikke er så mange her, der arbejder og underviser ud fra en ubetinget tillid til Bibelen som Guds Ord. De studerende har både brug for undervisning i troskab mod Skriften og støtte til at fastholde en ubetinget tillid til Skriften i mødet med bibelkritikken og liberalteologien. Og *det er positivt* gang på gang at møde studerende, der gerne vil have støtte også på disse punkter.

Ellers så udvider, udvider og udvider TEKU. Der bygges for tiden - hele tiden – pgra at de mange nye studerende, der kommer. Næste år skal man f.eks. også kunne læse spansk på TEKU, og der åbnes et medicinsk fakultet, et fakultet, der dog fysisk skal holde til i Sikonge ca. 500 km fra Mbeya nordpå i forbindelse med Brødrekirkens hospital der.

## Kwa heri

Sådan siger man farvel på swahili og det betyder 'med velsignelse'. Og tiden er nu kommet til at sige 'kwa heri' for et længere stykke tid – til TEKU og til Tanzania. Det næste halvår vil jeg være hjemme på Færøerne hvilket så også indebærer et par måneders møderejse i Danmark.

Det meste er efterhånden pakket ned, mine logerende, Claus og Kristiane, rejser på søndag, og er begge blevet ansat som lærere på Løgumkloster Efterskole (og det kan efterskolen glæde sig til), jeg pakker så det sidste, og så skal julen fejres i Hillerød hos Silas og Julianna, inden turen efter planen går til Færøerne d. 2. januar.

I skrivende stund er det dog lidt usikkert, hvordan den nærmeste tid kommer til at forme sig, da Anne-Lene pt venter derhjemme på at blive indlagt på rigshospitalet i København, da hovedet rumsterer lidt meget igen. Men *det er positivt* at også i vores sygdom og lidelse, ja, selv i vor død, da er vi som kristne i Guds gode hænder.

Med ønsket om en glædelig jul
kærlig hilsen og Guds fred
Peter

# Undursama kraftin í fyrigevingini

Effie Campbell,
týddi

Johannes Amritzer talaði og greiddi frá sínum lívi á Visjon Norge. Mamma hansara var alkoholikari og drakk allan barndóm teirra. Hon búði saman við rúsevnismisnýtarum einum fyri og øðrum eftir. Teir brúktu hasj og amfetamin. Eldri bróðir hansara varð fyrst frelstur, og tá ið Johannes varð 17 ár, bleiv hann eisini frelstur. So rýmdu teir burtur úr hesum umhvørvinum. Men Johannes hevði nógv djúp og greflig sár innan í sær og var fullur av hatri og beiskleika av øllum tí, hann hevði upplivað sum barn. Hann greiðir soleiðis frá: Tað undursamasta av øllum er fyrigevingin. Tá ið muslimar og hinduarar spyrja meg, hvat ið kristindómurin stutt snýr seg um, svari eg fyrigeving. Tí Jesus hevur fyrigivið okkum, tá ið hann á krossinum rindaði fyri alla syndaskuld í heiminum, og tí skulu vit eisini fyrigeva øllum øðrum. Fyrst skal eg siga eitt sindur um míni barnaár. Einaferð tók ein maður, sum ballaðist saman við mammu, eina brennandi sigar og stakk hana fleiri ferðir inn í armin á systur míni, sum skríggjaði og græt. Hon var bara 4 ára gomul. Eg var 2 ár eldri og royndi at verja systur mína. Men hvussu kann ein 6 ára gamal drongur standa seg ímóti einum vaksnum manni? Hesin maður var so sadistiskur, ja, bart út sagt devulssettur. Hann hevði eisini gjørt so nógv annað við okkum. Tá ið eg lá í songini, setti eg mær fyri, at tá ið eg bleiv stórur, skuldi eg drepa henda mannin. Eg samlaði upp á nógvan beiskleika og hatur í mínum hjarta, og eg gjørdist skitnari og skitnari innan. Tað var so nógv, sum eg skuldi gera, tá ið eg bleiv stórur. Barndómurin var oyðilagdur. Vit høvdu onga umsorgan fingið. Ofta varð eg stongdur inni í einum kamari, meðan drykkjuveitslan vardi, og orðini og lívið, sum trongdi seg inn gjøgnum tann tunna veggin, ja, tað ber ikki til at seta tey á prent. Eg varð eisini ofta bankaður, og eg visti als ikki hví. Kanska var tað tí, at eg av tilvild stóð framman fyri sjónvarpinum Eg bleiv frelstur, av tí at ein drongur, sum var 4 ár eldri enn eg, tímdi at brúka tíð upp á meg og greiða mær frá evangeliinum. Eg segði við henda drongin: “Hygg at hasum og hygg at hasum. Teir skuldu eitast at vera kristnir; men teirra kristinlív er fullkomiliga miseydnað. Alt hevur verið ein sjónleikur, og nú er tað eitt stórt skrædl.” “Ja, men Jesus kann ikki gera við, hvussu menniskju bera seg at. At vera kristin er ikki at hyggja upp á menniskju, men at hyggja upp á Kristus. Tað er hann, sum kann geva tær eitt nýtt lív og eingin annar.”

Eftir nøkrum tímum skilti eg, hvussu tað hekk saman. Hann bað frelsubønina við mær, og eg lá á knæ og græt, rætti armarnar móti himli og kundi bara siga: Jesus, Jesus, Jesus. Eg var nýfrelstur. Eg dugdi onga aðra bøn; men hvørja ferð eg rópti: Jesus, Jesus, Jesus, so var tað sum ein skitin klumpur loysnaði úr bringuni á mær og fór út. Onkuntíð rópti eg: “Jesus, tak alt tað skitna út úr mær!” Viðhvørt rópti eg: “Tak tær av mammu míni!” Og so rópti eg aftur: “Jesus, Jesus, Jesus!” Hetta helt á í tveir tímar; men tá var alt tað skitna loysnað úr bringuni á mær, og eg kendi meg so gullreinan og ómetaliga glaðan. Eg hevði uppdagað loyndarmálið við fyrigevingini. Vit búðu í Jönköping. Eg fór heim til mammu at siga henni frá hesum. Tey høvdu ballast kvøldið fyri. Full øskubikar, fløskur og skitin gløs stóðu allastaðni, og vínblettir vóru á gólvinum. Mamma hevði verið trúgvandi sum genta; men nú hevði hon andstygd fyri øllum kristindómi. “Eg vil ikki hava pávan inni her hjá mær,” rópti hon, tá ið eg segði, at nú var eg frelstur. Mamma hevði timburmenn. Hon var í kimono, og hárið stóð í andarisa. Vinmaðurin hjá henni kom út. Hann roykti nógv hasj og var hippi. Hann man hava ligið í dvala, tí hann er ikki vorðin varur við, at hippitíðin langt síðani er liðug. Vit settu okkum við borðið og fingu okkum ein kaffimunn. Eg royndi at greiða teimum frá, at Jesus kom her niður at doyggja fyri okkum, so at vit kundu fáa fyrigeving. Hansara blóð reinsar okkum, so vit verða hvítari enn snjó. Øll óhumska og allur skitturin innan í okkum loysnar og fer út. Tað endaði við, at tey rendu meg á dyr. Nú kanst tú kanska siga, at eg var eitt offur fyri tær umstøðurnar, ið eg var vaksin upp í. Tað var ein tíð, tá ið eg eisini helt tað, og enn eru menniskju, sum geva umstøðunum, familjuni og øllum øðrum skyldina. Men tað er tí, at tey ikki rættiliga hava sæð,

hvussu tingini hanga saman. Fyri at lýsa hetta, skal eg koma við einari søgu: Ein eldri kona hevði gjørt ein góðan døgurða. Tá ið maðurin var mettur og væl settur, legði hann seg á sofuna at fáa sær ein blund. Skjótt lá hann í fasta svøvni. Hann hevði eitt stórt og stívt skegg. Níggju ára gamli abbasonurin var og vitjaði tey. Hann situr eina løtu uppi yvir abbanum og hyggur at hesum stuttliga skegginum, sum vaggar upp og niður, tá ið gamli snorkar. Tá finnur abbasonurin uppá at fara í kuldaskápið og taka ein ost, ið liggur har. Tey kalla tað "Gammel Dansk". Hann smyr allan ostin upp í skeggið á abbanum. Tá ið gamli vaknar, setist hann upp undir seg og rembir sær. Tá merkir hann henda fúla luktin. Hann skuldi júst spyrja, um tað var abbasonurin, sum hevði kukkað í buksurnar; men so kom hann at minnast, at drongurin var níggju ár. Hann hugdi uttan um seg allastaðni. Mundi tað vera kettan, sum hevði tikið eina rottu og dragsað hana inn? Uttan mun til hvat rúm, hann fór inn í, so stinkaði tað. At enda fór hann ein súkklutúr fyri at fáa sær fríska luft; men allir rósurunnarnir, sum hann súkklaði framvið, stinkaðu ræstir. "Øll verðin luktar rotin og røst," hugsaði hann. Tá ið hann kom til hús og gramdi seg, segði konan: "Far og hygg í spegLið inni á baðirúminum. Tú hevur ein heilan ost uppi í skegginum." Tá sá hann, at tað vóru ikki hini, ið luktaðu, men hann sjálvur Vit gremja okkum ofta um hini; men Bíblian sigur: "Tí at øll hava syndað, og teimum vantar Guds heiður." Róm. 3,23. Tá ið vit so hava fingið fyrigeving frá Gudi, hava vit skyldu at fyrigeva øðrum. Annars verður tað, sum við bilinum. Fyrst hostar motorurin, og síðani steðgar hann. Vilja vit ikki fyrigeva, kemur steðgur í okkara kristnilív. Eg var farin á eitt ungdómsmøti. Vit lovsungu Gudi við upplyftum hondum. Tað var so undurfult; men so gongur hurðin brádliga. Tá ið eg hyggi, hvør ið kemur inn, er tað ein drongur, sum einaferð hevur gingið í flokki við mær. "Á nei, ikki hann," hugsaði eg, tí eg hevði saman við øðrum mangan happað hann ógvuliga illa í skúlatíðini. "Hvat gert tú her, tín hyklari?" spurdi hann óður. Øll hini hugdu upp á meg. Armarnir dalaðu niður. Eg fekk ikki lovsungið longur. Eg visti, hvat ið eg átti at gera. Higartil hevði eg í mínum stutta kristinlívi bara fingið, nú mátti eg fyri fyrstu ferð geva. Eg trokaði meg yvir til hansara og segði: "Vit mugu tosa saman." "Eg havi einki at tosa við teg um," svaraði hann. "Kanst tú fyrigeva mær?" spurdi eg, og so fór eg at gráta. Tað er undursamt við gráti, hann loysir okkurt í okkum og ger eisini okkurt við mótpartin. Hann kroysti meg fast inn at sær, og eg bað hann so miriliga um fyrigeving, og hana fekk eg. Tú verður so heitur og mjúkur innan av fyrigevingini.

Tá ið eg kom yvir aftur til sess mín, var eg dupult so fríur at prísa Gudi, og hin skitni klumpurin í bringuni var horvin. Eg vildi so fegin, at mamma skuldi blíva frelst, so eg fór at vitja hana. "Um tú kanst vísa mær ein frelstan persón í mínum aldri, sum ikki er hyklari, so skal eg trúgva tær," svaraði hon.

Eg hugsaði beinanvegin um vermóður mína, sum er eitt so inniligt Guds barn. Hon kom at tosa við mammu og bað frelsubønina við henni, og mamma bleiv frelst. Aftaná bjóðaði mamma mær til døgurða í íbúð síni. Har var ikki nógv inni, bara eitt borð, tveir stólar, tveir borðiskar, tvær skeiðir, tveir gaflar og tveir knívar. Men tá ið eg kom, stóðu tvey ljós á borðinum. "Vit mugu biðja fyri matinum," segði hon. Tað var løgið at hoyra mammu siga tað. Tað virkaði púra fremmant fyri mær. Tá ið eg skuldi fara at fáa mær, fór hon at tosa, og eg visti, hvat ið hon ætlaði sær at siga. "Tú, Johannes, tú mást fyrigeva mær." Eg hugsaði við mær: "Álvaratos, tað er púra ógjørligt. Eg havi livað 14 ár í helviti." Tað var nevniliga tann tíðin, har hon hevði drukkið. Hon hevði svikið okkum og onga umsorgan víst okkum. Í øll hesi mongu ár hevði eg pínst og fingið mein av tí. Men eg visti, hvat ið eg átti at gera, tí eg kendi Guds orð og kraftina í fyrigevingini, so eg svaraði, sjálvt um eg ikki føldi nakað serligt innan: "Ja, mamma eg fyrigevi tær. Jesus hevur fyrigivið mær alt, ið eg havi gjørt móti honum, og tí eigi eg eisini at fyrigeva." Hon fall á knæ, græt og snoraði og kroysti meg inn at sær. Hevur tú nakrantíð sæð undirvørrina á einari lítlari mammu ristast? Tá eru mammurnar sum søtast! Soleiðis sótu vit í einar tveir tímar. Maturin kólnaði, men tað bilti einki. Hon helt á at siga: "Fyrigev mær, Johannes," og eg svaraði: "Ja, mamma, eg fyrigevi tær." Og fyri hvørja ferð, ið vit søgdu tað, so loysnaði ein skitin klumpur úr bringuni og var burtur, og sárini lektust. Tað er ein megi uttan líka í fyrigevingini. Henda kraftin kemur úr sárunum, sum Jesus fekk, tá ið teir krossfestu hann. Læknar og sálarfrøðingar kenna einki til hesa grøðandi megi. Vit tosa ongantíð um farin ár, tí tey eru grivin, og Jesu blóð fjalir tey. Míni børn skulu ikki hoyra um, hvussu ringan barndóm eg fekk. Tey skulu ikki bera nakað negativt í sínum kenslum. Tey elska ommuna, og hon er so ómetaliga góð við tey. Betri ommu kundu tey ikki ynskt sær. Vit eru ikki offur fyri umstøðurnar, uttan so at vit gera okkum til eitt offur. Vit kunnu broyta umsøðurnar. Fyri at lýsa tað betri, skal eg siga eina søgu. Ein maður var so illa plágaður av rottum. Tær vóru allastaðni, undir borðinum, uppi í songini, ja, runt í allari íbúðini. Hann royndi við rottugift og

fellum; men tað gav einki úrslit. Í sínari neyð vendi hann sær til ein vinmann og bað hann hjálpa sær. “Gaman í,” segði vinmaðurin. Tá ið hann kom inn í íbúðina hjá hinum, segði hann: “Her má ruddast.” Og tað trongdi til. Har vóru stórir bunkar av pitsapakkum og mjólkarpakkum við einum sløgi av mjólk í. Tá ið alt var ruddað, rýmdu rotturnar, tí nú var einki at eta hjá teimum og ongastaðni at fjala seg. Og soleiðis er tað við okkum. Loyva vit Jesu fyrigevandi kraft at fylla okkum, so fara allir teir skitnu klumparnir í bringuni, sum vit hava savnað gjøgnum alt lívið, at hvørva. Vit mugu rudda húsið, t.v.s. hjarta okkara, sum skal vera tempul Heilaga Andans, tá víkur alt ónt, allar “demon-rotturnar”. Paulus sigur í 1. Kor. 11,27-30, at mong eru ússalig og sjúk teirra millum, og summi eru sovnað burtur. Tað er tí, at tey goyma beiskleika í hjarta sínum staðin fyri at blaka hann har, hann hoyrir heima, við Jesu føtur. Jákup sigur tað soleiðis: “Játtið tí syndirnar hvør fyri øðrum og biðið hvør fyri øðrum, fyri at tit mega verða grøddir.” Ják. 5,16. Pætur gevur monnunum boð um at elska konur sínar meir, fyri at bønir teirra ikki mega hindrast. 1. Pæt. 3,7. Einaferð, tá ið eg var heima hjá ungdómsspresti mínum, sótu vit á sofuni hjá honum og prísaðu Gudi. Mitt í øllum kendi eg meg illa innan. Eg fekk ikki tilbiðið og fall niður á knæ á gólvinum. Hann fall á knæ saman við mær og segði: “Johannes, eg hugsi, at tað er onkur persónur, sum tú eigur at fyrigeva.” Løgið var tað, men í somu løtu, sum hann segði tað, so visti eg, hvør tann persónurin var, sum eg átti at fyrigeva. Tað var maðurin, sum brendi systur mína. “Nei, eg kann ikki. Øllum øðrum kann eg fyrigeva, bara ikki honum.” “Royn. Sig navnið á honum og sig so, eg fyrigevi tær. Vita nú.” “Tað blívur bara til hykl, tí eg meini tað ikki.” “Kom nú, royn. Nevn navnið á honum hart og sig so, at tú fyrigevur honum.”

Eg gjørdi eftir hansara ráðum, og fyri hvørja ferð, ið eg nevndi navn hansara og segði, at eg fyrigav honum, fekk eg tað betri. At enda var eg fríur og reinur innan. Og hvussu bleiv tað so við hesum manni? Jú, eina tíð eftir at eg var blivin umvendur, kom eg koyrandi í bili. Tá sá eg hann á gongubreytini á veg inn til sín. Eg høgdi bremsurnar í og rann tað dýrasta, eg var mentur. Tá eg kom yvir til hann, tók eg harðliga í jakkan hjá honum og spurdi, um hann kendi meg. Hann varð líkbleikur, og hann kendi meg beinanvegin, tað sást skilliga. “Slepp mær,” stunaði hann. Nú var hann vorðin gamal, og nú var tað eg, sum hevði vøddarnar. “So býttur eri eg ikki, at eg sleppi tær,” segði eg, “tí so smýgur tú tær avstað. Nei, nú skalt tú lurta eftir mær! Tú brendi systur mín, tá ið hon bara var 4 ára gomul. Eitt sovorðið svín vart tú, umframt alt annað tú gjørdi. Men nú eri eg vorðin ungdómsprestur, og Jesus hevur fyrigivið mær, og tí fyrigevi eg tær fyri hansara skuld.” Tá ið eg hevði sagt tað, slepti eg honum, tí eg føldi, at nú hevði eg ikki meira innan í mær, sum var ímóti honum, og hann reyk avstað. Tá gjørdi eg størstu uppdagingina, sum eg havi gjørt í øllum mínum kristna lívi. Eg havi sæð nógv stór undur kring alt Evropa, blind fáa sjón, Jesus umbroytir menniskju og mangt annað. Men nú var tað, sum allur himmalin kom niður í bilin. Eg fekk als ikki koyrt. Eg lyfti armarnar upp og prísaði Gudi. Eg var so fríur, so fríur. “Um tí sonurin fríar tykkum, tá skulu tit verða av sonnum frælsir.” Jóh. 8,36. Ein ómetalig grøðing er í fyrigevingini. Ein ómetalig frígering og linni er í fyrigevingini. Eg havi lært nógv um hetta at fyrigeva. Fyri hvørja ferð, tú fyrigevur, kemur tú nærri Jesusi. Tú sært hann so klárt. Hann er undurfullur. Eg havi skrivað brøv og ringt til nógvar persónar, sum hava sært meg, og eg havi sagt við teir: “Eg fyrigevi tær.” Tað kunnu vera tíðindafólk, blaðmenn og kristnir leiðarar, sum misskilja teg, og sum tí siga bæði eitt og annað um teg. Men eg havi gjørt av, at eg vil fyrigeva øllum, sum í framtíðini fara at særa meg.

Saman við fleiri ungum havi eg stovnað eitt, sum kallast SOS. Vit eru úti á gøtunum kring allan heimin og boða evangeliið og seta meinigheitir á stovn. Higartil hava vit sett 340 meinigheitir á stovn. Bara hetta síðsta hálva árið hava 25 nýggj kirkjulið sæð dagsins ljós, og 9.000 menniskju eru blivin frelst. Eg takki Gudi, at hann fann meg á ungdómsárum, og at hann nú kann brúka meg í síni tænastu til signingar fyri míni medmenniskju.

Effie Campbell.

# Toruveður

Signa, Sámal og Teitur stóðu við vindeygað og hugdu út. Tað var longu vorðið rættiliga myrkt, og himmalin var gráur. Sjálvt um hetta var mitt á degi, var tað heilt myrkt inni í stovuni. Teitur var glaður, at tey ikki vóru einsamøll í stovuni, men at abbi eisini var har. "Eitt ræðuligt toruveður nærkast," segði abbi, sum eisini kom yvir til vindeygað og stillaði seg undir liðina á børnunum. "Kunnu vit ikki tendra?" knarraði Teitur, tí hann var so bebbaræddur fyri toruni, at hann helst vildi lopið avstað og fjalt seg inni á botni í klædnaskápinum. "Nei, tað er einki stuttligt! So síggi eg ikki, tá ið snarljósini ganga, og tað er jú tað, sum er so stórbært at síggja," segði Signa. "Snarljósini eru so smart og hábærslig," helt hon á og stardi at teimum svørtu skýggjunum, sum nærkaðust. Sámal segði einki. Hann stóð og hugdi at einum stórum toruskýggi, sum sá út sum ein yvirvaksin sandsekkur, sum kundi skrædnað nær sum helst, og so ... Tað myrknaði í hvørjum uttanfyri, og so bleiv alt kvirt. Ikki eitt ljóð hoyrdist. Huff, tað var næstan, so tú stirðnaði, hóast tað var so kvalið og slavið, at klæðini kleimdust at kroppinum. "Nei, nú mugu vit ið hvussu er tendra," helt Teitur. "Hvat í víðu verð sigur tú, tað er ikki nátt enn!" mótmælti Signa. "Men tað er ið hvussu er kvøld!" Sámal slepti ikki hondini á abba og flutti seg ikki ein tumma at tendra ljósið. Tá - við eitt - gjørdist tað so ljóst inni sum á alljósum degi! "Hygg, eitt snarljós!" rópti Sámal. "Hatta skýggið, sum líktist einum sekki, skrædnaði!" "Eitt afturat!" Stovan gjørdist heilt hvít og lýsti sum á einum sólskinsdegi. Men tað gekk so skjótt, og brádliga var stovan bølamyrk aftur. Og nú tóktist tað uppaftur myrkari enn í áðni. So kom torudunið! Eitt øgiligt dundur, sum helt á at buldra avstað millum fjøllini, áðrenn tað heilt doyði burtur. "Nei, nú haldi eg, at vit tendra!" segði Teitur. Signa stóð longu við kontaktina og trýsti á. Ljósið munaði ikki so nógv, men kortini kendist tað gott at fáa tendrað. Og nú kendu bæði Sámal og Teitur seg tryggar og nøgdar. "Eg haldi eisini, at snarljósini eru vøkur," segði lítli Teitur og tók fast í hondina á abba. "Men toran kann eisini sláa niður, ha?" spurdi Signa. "Ikki hjá okkum," svaraði abbi, "tí vit hava snarljósleiðara. Høgt uppi á tekjuni er ein antenna, og á henni er ein kopartráður, sum gongur heilt frá tekjuni og niður í jørðina. Hann leiðir snarljósið niður í jørðina, so tað ikki slær niður í húsini. Fyrr í tíðini høvdu fólk ongar snarljósleiðarar, og tá kundi tað vera rættiliga vandamikið við toruveðri." "Góði, fitti, abbi, sig okkum, hvussu tað var fyrr í tíðini!" Tey settu seg kring borðið, sum stóð við vindeygað, og so fór abbi at siga frá. "Tá ið eg var lítil, ræddist eg øgiliga illa toruna. Næstan altíð sló toran niður onkustaðni, har hon ikki skuldi sláa niður. Eitt gamalt træ, sum stóð mitt í túninum, klovnaði í tvey, tá ið toran sló niður. Jú, tað skal eg siga tykkum, at vit vóru bangin. Øll børnini inni hjá okkum krupu saman rundan um ommu. Myrkt og óhugnaligt var bæði úti og inni. Hvørja ferð, vit sóu eitt snarljós, fóru vit at telja: Eitt, tvey, trý, fýra, fimm, seks. Jú longri vit fingu stundir at telja, jú longri burtur var toran. Tað vistu vit. Kundu vit telja upp í tjúgu, var hon okkurt um sjey kilometrar burturi. Viðhvørt komu vit ikki longur enn upp í níggju. Tá var toran ómetaliga nær, bara tríggjar kilometrar haðani. Tit munnu vita, at tað er snarljósið, sum er vandamikið, ikki torubuldrið. Men ljóðið ferðast ikki so skjótt sum ljósið, so ein lítil løta gongur, áðrenn ljóðið kemur vegin fram til oyru okkara, um toran slær niður nakað frá okkum. Um hon slær niður ein kilometur hiðani, so ganga trý sekund, áðrenn vit hoyra tað. Viðhvørt náddu vit bara at telja upp í trý. Tá vistu vit, at toruveðrið var bara ein kilometur haðani! Tá noyddust vit at fara í stivlar og tjúkk klæði, tí vit vistu ongantíð, hvat ið fór at henda. Sum oftast fór toruveðrið framvið eitt petti haðani. Men eg minnist eisini, at vit av og á ikki fingu stundir at telja so frægt sum upp í eitt. Næstan samstundis, sum snarljósið gekk, kom buldrið! Tá sótu vit bara og bíðaðu og væntaðu tað versta. Brádliga kom regnið - stórir og tungir dropar. Tað oysti niður, meðan skýggini stoyttu vatnið úr sær. Og tað skvampaði úr øllum takrennum og trummaði móti vindeygarútunum. Tá reistist omma og segði: "Takk, góði Gud, nú er óveðrið liðugt fyri hesa ferð!" Og vit onnur fóru at lata okkum úr yvirklæðunum, og tað lætnaði fyri okkum. Næstu ferð, snarljósið gekk, fingu vit talt upp í fimm. Og síðani upp í sjey, so upp í níggju - og at enda upp í tjúgu. So sleit í, og vit kundu halda á at spæla sum frammanundan." Signa, Sámal og Teitur høvdu sitið pinnastill og lurtað. Nú hoyrdu tey, hvussu tað fór at skvatla og renna uttanfyri. Tað var regnið, ið nærkaðist. Næstu ferð, snarljósið gekk, fóru tey at telja hart: Eitt, tvey, trý, fýra, fimm - ja, heilt upp í tjúgu komu tey! "Toran er næstan sjey kilometrar hiðani!" segði Signa. "Tað er langt hiðani," segði Sámal. "Ja, øgiliga langt," legði Teitur uppí. "Sum tað er keðiligt," segði Signa, "tí eg havi altíð hildið tað sæð so stórbært út, tá ið snarljósini ganga."

Effie Campbell,
týddi

# BARNASÍÐAN

## Páskavikan

Petra Gregersen

Ja, nú eru páskirnar í hondum, og tí kundi tað verið áhugavert at vita, hvat hendi hesa vikuna. Vikan frá pálmasunnudegi til páskadag verður kallað dymbildagavikan ella stilla vikan, og siður hevur verið at halda frið hesa vikuna. Skipað hevur ikki verið fyri tiltøkum hesa vikuna, men ístaðin hava fólk fyrireika seg til páskirnar.

Pálmasunnudag reið Jesus inn í Jerusalem á einum asna. Fólkini løgdu klæði síni og pálmagreinar á vegin og lovaðu Gudi. Á henda hátt vísti Jesus mannfjøldini, at hann var Messias og ein friðarskapandi kongur. Har var nógvur gangur, og farisearanir bóðu Jesus hava at fólkunum, men hann svaraði teimum, at um fólkini høvdu tagt, so mundu steinarnir havt rópt.

Í hesi vikuni ruddaði Jesus halgidómin. Í uttasta tempulgarðinum høvdu handils- og gjaldoyrahandilsmenn sínar búðir. Har keyptu jødar sær djór, sum teir skuldu ofra og vekslaðu sín pening til tempulgjaldoyru, so at teir kundu gjalda tempulavgjald. Tá Jesus sá, at handilsmenninir snýttu fólkið, gjørdist hann illur og koppaði borðini hjá teimum.

Judas beyð sær eisini at svíkja Jesus í hesi vikuni. Hann fór sjálvur til teir leiðandi prestarnar og spurdi, hvussu nógv hann fekk afturfyri, um hann hjálpti teimum at fáa fatur í Jesusi. Teir góvu honum 30 silvurmyntir, og tað var hann nøgdur við. So fór hann at hugsa um, hvussu og nær hann skuldi svíkja Jesus.

Jesus gisti, sum hann plagdi hjá Mariu, Marthu og Lásarus í Betaniu, tí um páskirnar komu tað altíð nógv fólk til Jerusalems, og tað var ikki lætt at finna nakað at búgva í um páskirnar.

Skírishósdag bað Jesus Pætur og Jóhannes fara til Jerusalems at fyrireika páskamáltíðina. Um kvøldið ótu Jesus og lærusveinarnir páskalambið. Jesus segði lærisveinunum frá, at Judas fór at svíkja hann. Judas fór avstað, og seinni um kvøldið, tá ið Jesus og lærisveinarnir vóru í Getsemane, har Jesus bað, kom Judas við hermonnunum eftir Jesusi.

Náttina fyri langafríggjadag var Jesus avhoyrdur av høvuðsprestunum og ráðnum. Langafríggjadag var hann førdur til Pilatus. Tá Pilatus sá, at Jesus onki hevði gjørt, og tí ikki kundi dømast til deyða, koyrdi hann víðari til Heródes kong. Heródes avhoyrdi Jesus, men koyrdi hann so aftur til Pilatus. Av ótta fyri fólkinum læt Pilatus Jesus krossfesta. Jesus varð jarðaður í grøvini hjá einum manni, sum æt Jósef.

Leygardagin hendi onki, tí tá var sabbatsdagur, hvíludagurin hjá jødum, og henda dagin mátti eingin gera nakað.

Páskadag fóru tvær kvinnur út til grøvina hjá Jesusi. Tær gjørdust bilsnar, tá ið tær sóu, at steinurin, sum hevði verið fyri gravarmunnan, var koyrdur frá. Tær fóru inn í grøvina, men Jesus var ikki har. Ein eingil segði teimum, at Jesus var risin upp. Seinni um dagin vísti Jesus seg fyri lærisveinunum og um kvøldið fyri tveimum monnum, sum vóru á veg til Emmaus.

Postavgreitt blað

# BARNASÍÐAN

Petra Gregersen

**Litið myndina niðanfyri**

b: blátt   r: reytt   g: grønt   h: hvítt   s: svart




*Umbróting:*
*Brandur Petersen*

*Prent:*
*Estra*

*Ábyrgd:*
*Kristian Thorleifsson*

*Útgevari:*
*Kirkjuliga Missiónsfelagið*
*Purkugerði 7*
*FO-100 Tórshavn*
*Tlf.: 225511*
*T-postur: kmf@kmf.fo*
*Heimasíða: www.kmf.fo*
*Konta: 9181-495.337.3*

*Kirkjuligt Missiónsblað kemur út 8 ferðir um árið (1/2, 15/3, 1/5, 15/6, 1/8, 15/9, 1/11, og 15/12)*

*Haldaragjald: kr. 150,-*